BØRNE- OG
UNDERVISNINGSMINISTERIET

# Næmingaluttøka

Eitt savn av mannagongdum og amboðum til at styrka um næmingaluttøkuna í fólkaskúlunum og miðnámsskúlunum



# Yvirlit yvir mennararnar og valdar mannagongdir og amboð

Hetta verkið er ein samanseting av valdum mannagongdum og amboðum, sum eru ment av hesum felagsskapum:

KOSMOS
Nationalt Videncenter

**KOSMOS** er landsfevnandi miðdepil fyri kost, venjing og heilsu fyri børn og ungdóm í Danmark.
**Amboð 1b** er ein víðarimenning av Virksemisstiganum hjá Roger Hart, sum KOSMOS hevur ment fyri danska Barna- og Undirvísingamálaráðið.

BØRNE- OG UNDERVISNINGSMINISTERIET
STYRELSEN FOR UNDERVISNING OG KVALITET

**Styrelsen for Undervisning og Kvalitet** er eitt stýri undir danska Barna- og Undirvísingamálaráðnum, sum hevur ábyrgd av menningini av innihaldi, endamáli og góðsku av útbúgving.
**Amboð 1c** er frá *Demokrati og aktivt medborgerskab på erhvervsuddannelserne (Demokrati og virkin samborgaraskapur í yrkisútbúgvingunum)*, sum er eitt verk, ið inniheldur mannagongdir og amboð til serkøna sjálvhugsan og menning av mannagongdum. Verkið er tøkt á heimasíðuni hjá danska Barna- og Undirvísingamálaráðnum Demokrati under udvikling.
**Amboð 2b, 2l og 2m** eru ment til hetta verk.

**Amboð 2e** er frá *Set tín dám á (Sæt dit aftryk)*, sum er eitt verk, ið leggur seg eftir at skapa næmingaluttøku, næmingademokrati og sterk næmingaráð. Verkið er tøkt á heimasíðuni hjá danska Barna- og Undirvísingamálaráðnum Demokrati under udvikling.

amondo

**Amondo** er ein ráðgevandi fyritøka, sum ráðgevur um broytingargongdir og menningarverkætlanir.
**Amboðini 1d og 2f-2k** eru úr verkinum, *Guide til elevinddragelse (Leiðbeining til næmingavirksemi)*, sum er eitt savn av hugkveikjandi tilfari til lærarar og toymi av undirvísarum til at draga næmingarøddirnar inn í lærufelagsskapin. Alt tilfarið er at finna á heimasíðuni hjá Amondo.

Skolverket

**Skolverket** er svenska tjóðarskrivstovan fyri útbúgving. Skoleverket er høvuðsfyrisitingarligi myndugleikin fyri almennu skúlaskipanina, alment skipaðar barnagarðar, barnaansing fyri børn í skúlaaldri og undirvísing fyri vaksin.
**Amboð 1e og 2c** eru frá *Delaktighet och inflytande I undervisningen (Luttøka og ávirkan á undirvísing)*, sum gevur lærarum vitan og amboð til, hvussu teir skulu arbeiða við og ávirka næmingaluttøku og ávirkan í undirvísingini. Alt tilfarið er at finna á heimasíðuni hjá Skolverket.

Danske Skoleelever

**Danske Skoleelever** er ein óheftur áhugabólkur fyri næmingar í t.d. fólka og miðnámsskúlum í Danmark. Millum annað arbeiðir felagsskapurin við útbreiðslu av næmingademokrati.
**Amboð 2d** er ment av Danske Skoleelever við stuðli frá ráðnum fyri børn og útbúgving í Danmark.
Alt tilfarið er at finna á heimasíðuni hjá Danske Skoleelever undir verkætlanini Student involvement in teaching.

# Næmingaluttøka



## Eitt savn av mannagongdum og amboðum til at styrka um næmingaluttøkuna í fólkaskúlunum og miðnámsskúlunum



# Innihald


Inngangur til skúlaleiðarar og starvsfólk 6

**1. Professionell sjálvhugsan og gransking av verandi mannagongdum 9**

1.a. Inngangur 9
1.b. Virksemisstigin 10
1.c. Pulsmáting av gerandisfólkaræði 12
1.d. Verulig ávirkan 17
1.e. Kanning av møguleikum hjá næmingum at luttaka og ávirka 18

**2. Amboð til at menna mannagongd 19**

2.a. Inngangur 19
2.b. Yvirlit - Møguleikar fyri øktari næmingaávirkan í skúlanum 20
2.c. Menningarvirksemi, sum virkar fyri næmingaluttøku 22
2.d. Næmingavirksemi sum putlispæl 23
2.e. Sløg av felagsskapum, sum virka fyri næmingaávirkan og luttøku 26
2.f. Tíðarætlan fyri virksemismannagongdir 28
2.g. Áminningarlisti til virksemismannagongdir 29
2.h. Hugskotsmenning - Speakers' Corner 30
2.i. Bygg og eftirmet eitt hugskot 32
2.j. Legubál av hugskotum og broyttari hugsan 34
2.k. Formur til raðfestingar 36
2.l. Samanumtøka av, hvussu næmingarnir uppliva næmingaluttøku 38
2.m. Spurningar til sjálv-reflektión fyri at varðveita arbeiðið fyri luttøku 40

**ÍSKOYTI 43**
Brot í putlispæli – fyri **amboð 2.d.** 44
Verkætlanarpílur - fyri **amboð 2.e.** 52

# Inngangur fyri skúlaleiðarar og lærarar



Hetta verk er til tykkum, sum eru lærarar ella leiðarar í miðnámsskúlum ella elstu flokkum í fólkaskúlum. Verkið miðar ímóti at styrkja arbeiðið við næmingaluttøku í undirvísingini. Við hesum verki hevur tú eitt amboð til at avdúka tína núverandi mannagongd fyri næmingaluttøku, eins væl og eitt amboð at menna og tryggja tína mannagongd. Verkið er eitt savn av fleiri verandi norðurlendskum amboðum, umfram fleiri nýmentum amboðum, sum saman geva eitt gott byjanarstig til at menna mannagongdirnar hjá skúlanum fyri næmingaluttøku.

## Bakgrund

Næmingaluttøka í fólka- og miðnámsskúla er í miðdeplinum í nógvari lóggávu í Norðurlondum[1]. Lóggávan krevur at næmingar á ymsan hátt og í ymiskan mun sleppa at ávirka sína egnu innlæring og undirvísing í gerandisdegnum í skúlanum.

Í Danmark, er hetta serliga týðiligt í parti 18(4) í donsku fólkaskúlalógini (Folkeskoleloven), sum sigur at, ”Skapanin av arbeiðsháttum og val av evnum, skal so vítt til ber vera í samstarvi millum lærarar og næmingar”[2]. Hóast tað, so upplivir meira enn ein triðingur av næmingunum í 4-9 flokki í Danmark, at tey aldrin, ella sjáldan hava ávirkan á, hvat flokkurin arbeiðir við[3].

Endamálið við hesum verki er at geva íblástur og ítøkilig arbeiðsamboð til at arbeiða við næmingaluttøku og stimbra einum høgum støði av virksemi bæði innan og uttan fyri floksstovuna.

## Hvussu verkið stuðlar tínum arbeiði við næmingaluttøku

Luttøka er meira enn at loyva næmingum at vera við til at taka avgerðir. Luttøka snýr seg um at skapa ein karm, har næmingar fáa møguleikan at hugsa um og siga frá sínum egnu meiningum. Luttøka kann blíva partur av frálæruni, karmunum fyri virksemi og venjingum, umframt málinum, sum tú tosar við næmingarnar. Kanningar benda á[4], at tá leiðslur hugsa um og raðfesta luttøku og ávirkan, so stimbrar tað menningina av eini mentan, einum felags máli og mannagongdum í sambandi við arbeiðið at geva børnum og ungum ávirkan.

Tí er ætlanin við hesum verki at stuðla fólkaræðnum sum mannagongd í skúlanum, og málbólkurin til hesa útgávu er skúlaleiðslan, lærararnir og onnur starvsfólk í skúlanum.

Ætlanin við verkinum er eisini, at tað kann blíva brúkt í øllum lærugreinum og sum ein inngrógvin partur av undirvísingini í staðin fyri til dømis bert at brúka tað í eina einstaka viku, har ljós verður varpað á fólkaræði.

---

1 "Kompetencer til aktivt medborgerskab - Analyse af de nordiske landes skolelovgivninger og læreplaner for samfundsfag", National Agency for Education and Quality, 2021.

2 2 Folkeskoleloven, LBK nr 1396 af 05/10/2022

3 Børne- og Undervisningsministeriet, Styrelsen for IT og læring (2022) www.uddannelsesstatistik.dk. Yvirlit yvir trivnaðin hjá næmingum í 4.-9. flokki í skúlaárinum fyri 2021/2022 Svara spurninginum: "Eru tú og floksfelagar tínir við til at avgera, hvat tit arbeiða við í flokkinum?".

4 Hør godt efter! "Kortlægning af kommunal børneinddragelse (2021)" - partur 1, Oxford Research commissioned by the National Council for Children, 2021

## Verkið er býtt upp í tveir partar:

1. **Professionell sjálvhugsan og gransking** av verandi mannagongdum

2. **Samanseting av amboðum** til menning av mannagongdum.

Tú upplivir kanska, at summi amboð ikki passa væl til tín arbeiðshátt. Um so er, kanst tú umhugsa eina aðra tilgond - til dømis kanst tú í tínum toymi kjakast um, hvussu amboðini kunnu blíva tillagað, so tey passa til málbólkin hjá tínum skúla. Tú kanst eisini umhugsa, um har eru partar av karmunum í skúlanum, sum kunnu blíva tillagaðir.

Har eru fleiri viðurskifti (lóggáva, kyn á næmingi, aldur, sosial bakgrund, búgvinskapur, hvussu torgreitt tilfarið er o.s.fr.), sum hava ávirkan á, í hvønn mun næmingar kunnu fáa ávirkan, og hvussu hetta kann fremjast í verki. Málið hevur verið at gera eitt savn av amboðum, sum eru so ítøkilig og løtt at brúka sum gjørligt. Tað er okkara vón, at hesi amboð kunnu blíva brúkt í øllum Norðurlondum - har hædd sjálvandi verður tikin fyri lokalum viðurskiftum.

## Hvussu brúkar tú verkið?

Verkið er býtt upp í tveir partar.

**Fyrri partur** gevur tær í høvuðsheitum amboð til professionella sjálvhugsan og gransking av verandi mannagongdum um luttøku.

**Annar partur** inniheldur amboð til menning av mannagongdum. Amboðini kunnu brúkast hvør sær. So tað er upp til tín at rannsaka verkið og skapa tínar egnu upplivingar. Málbólkurin og vænta ða tíðarnýtslan eru upplýst í hvørjum amboði.

### Vit vóna, at tú og tínir næmingar fáa nógv burturúr teimum nógvu amboðunum í hesum verki.

### Njótið tað!

Hetta savnið av mannagongdum og amboðum er sett saman av **Styrelsen for Undervisning og Kvalitet** í Danmark sum ein partur av verkætlanini hjá danska formansskapinum í Norðurlendska ráðharraráðnum ***Nordic Youth in Sustainable Communities***.

Nordisk Ministerråd

Hetta verk er givið út á donskum, svenskum, norskum, finskum, íslendskum, grønlendskum og føroyskum.



# 1.

# Professionell sjálvhugsan og gransking av verandi mannagongdum

## 1.a. Inngangur

Í fyrsta parti av verkinum eru fleiri dømi og venjingar, sum stuðla professionellari sjálvhugsan og gransking av verandi mannagongdum í skúlanum í samband við næmingaluttøku í undirvísingini og skúlanum sum heild. Ætlanin er, at tey ymisku amboðini skuldu hjálpa til at finna møgulig menningarøki í samband við styrkjan av næmingavirksemi.

Amboðini kunnu nýtast hvør sær at stuðla professionella vitan um næmingaluttøku og ávirkan. Tey kunnu eisini nýtast í felagsskapi sum ein partur av einari størri broyting hjá skúlanum at fremja næmingaluttøku.

Tit kunnu byrja við at fáa eitt yvirlit yvir øll amboðini. Í hesum parti síggja tit fyrst *Virksemisstigan*, sum er eitt visuelt amboð, ið kann nýtast til at kjakast og hugsa um næmingaluttøku. Síðani kemur amboðið *Pulsmáting*, sum er ein máti at kanna verandi mannagongdir hjá einstaka læraranum ella skúlanum í sambandi við luttøku. Við amboðnum *Verulig ávirkan* kunnu tit víðka kjakið til at snúgva seg um, nær tað eydnast tykkum at skapa veruliga ávirkan, umframt avbjóðingarnar, sum eru knýttar at tí. At enda er ein stigvís leiðbeining til eina meira nágreiniliga kanning av verandi mannagongdum.



# 1.b. Virksemisstigin

Amboðið er ein víðarimenning av Virksemisstiganum hjá Roger Hart, sum **KOSMOS** hevur ment fyri danska Barna- og Undirvísingarmálaráðið. Sí meira á síðu 2.

Amboðið kann brúkast sum grundarlag fyri kjakum í toymum ella millum starvsfólk í skúlanum um, hvussu næmingar kunnu fáa meira ávirkan.

Tíð: 2 tímar

## Um amboðið

Virksemistigin hevur 8 stig. Tey lýsa stigini sum næmingarnir kunnu dragast inn í undirvísingina uppá.

Virksemið hjá næmingum kann vera á ymiskum stigum, treytað av hvaðani fyrsta stigið kemur, hvat endamálið við virkseminum er, og ikki minni, hvørjar fortreytir næmingarnir hava. Tað er ikki altíð viðkomandi ella møguligt at arbeiða við virksemi á teimum hægstu stigunum. Fyri at veruligt virksemi skal henda er tað avgerandi, at luttakandi næmingarnir:

- Skilja endamálið við menningini/verkætlanini.
- Eru vitandi um, hvør vil hava tey við og hví.
- Hava fingið eina týðandi uppgávu, sum kann handfarast.

Tað eru ikki øll mál í skúlanum, sum kjakast kunnu um, tí har eru bæði lóggávukrøv og staðbundin krøv, sum atlit skulu takast til. Men næmingarnir eiga í minsta lagi at vera upplýstir um, um nakað kann kjakast um ella ikki, og hví.

Virksemisstigin vísir, at ymisk stig eru fyri næmingaluttøku. Hvørja ferð tú fert eitt stig longri upp, økist luttøkustigið:

**Á teimum lægri stigunum (1-3)** er *einki virksemi*. Á fyrsta stignum er næmingurin villleiddur. Á øðrum stignum er næmingurin ikki upplýstur. Á triðja stignum er næmingurin upplýstur og kennir orsøkirnar til umstøðurnar, men hevur ikki luttikið, ella bert luttikið í avmarkaðan mun í kjakinum.

**Á stigunum 4 til 5** er tað partvíst *virksemi*, har næmingurin fær møguleikan at kjakast, grunda og koma við hugskotum og íkasti til kjakið við øktari ávirkan á avgerðirnar hjá lærarum/undirvísarum á stigi 5.

**Á stigi 6 til 8** er tað eitt *høgt stig av virksemi* hjá næminginum, bæði í at vera við í avgerðum og ítøkiligum avgerðum. Her hava vit ein veruligan møguleika at skapa førleika til at virka. Á stigi 7 er tað bara næmingurin, sum kjakast, tekur avgerð og virkar, meðan 8 stig tekur læraran við sum ein javnlíki í mannagongdini at taka avgerðir.

## Hvussu

Virksemisstigin kann printast út sum plakat og heingjast upp.

Virksemisstigin kann hjálpa tær at skapa eitt felags mál og fatan av næmingaluttøku og stuðla einum tilvitandi og skipaðum hugburði til næmingaluttøku í tínum skúla.

Brúka Virksemisstigan sum eitt byrjanarstig til kjak, til dømis í hvønn mun næmingaávirkan merkir undirvísingina í tínum skúla í dag. Umhugsa, hvussu tað hevði sæð út, um næmingar høvdu meira ávirkan.

Tú kanst eisini brúka Virksemisstigan saman við fleiri øðrum amboðum í hesum verkinum. Til dømis í sambandi við 1.c., 1.d. og 1.e., har tú kanst máta tína núverandi mannagongd. Ella tú kanst vísa til Virksemisstigan, tá tú kjakast um og umhugsar broytingar av mannagongdum (til dømis í 2. c og 2. d).






**Sí Virksemisstigan á næstu síðu**




# Virksemi hjá næmingum

## 6-8 / Høgt virksemi

### 8: Virkisandi hjá næmingi, felags avgerðir taka lærarar/undirvísarar og næmingar við

Næmingar taka stig til at byrja verkætlanir og bjóða lærarum/undirvísarum við.

### 7: Virkisandi hjá næmingi og avgerðir hjá næmingi/næmingum

Næmingurin/næmingarnir taka stig til og hava førleika at taka avgerðir í skeiðinum/verkætlanini: Lærarin/undirvísarin er tøkur.

### 6: Lærarar/undirvísarar taka stig, felags avgerðir taka lærarar/undirvísarar og næmingar við

Lærari/undirvísari tekur stigið, men næmingurin/næmingarnir eru við í allari gongdini og eru við til at taka avgerðir.

## 4-5 / Partvíst virksemi

### 5: Spurdur og upplýstur

Skeiðið/verkætlanin er gjørd og framd av læraranum/undirvísaranum, men næmingurin/næmingarnir eru tiknir við upp á ráð, teir hava fult innlit í gongdina, og sjónarmiðini hjá teimum verða tikin í álvara.

### 4: Útnevndur og upplýstur

Lærari/undirvísari bjóðar næmingum at luttaka til eitt serligt høvi, sigur teimum hví og á hvørjum grundarlagi, har næmingurin/næmingarnir so gera av, um teir luttaka ella ikki.

## 1-3 / Einki virksemi

### 3: Symbolsk luttøka

Næmingarnir vera spurdir um teirra sjónarmið um eitt ávíst evni. Teir hava ongan ella lítlan møguleika at ávirka háttin, ið teir kunnu bera seg fram.

### 2: Pynt

Næmingar luttaka, men skilja ikki, hvat tað er um.

### 1: Manipulatión

Næmingur/næmingar siga og gera tað, sum tey vaksnu skjóta upp/siga, tey skulu gera. Ella lærarin/undirvísarin spyr næmingarnar og nýtir partar av útsøgnum hjá næmingunum, men gevur ikki næmingunum afturboðan um hvørja ávirkan, teir hava havt.

# 1.c. Pulsmáting av gerandisfólkaræði

Hetta amboðið er ment av Styrelsen for Undervisning og Kvalitet. Sí meira á síðu 2

Amboðið kann brúkast av einum toymi ella ímillum starvsfólk á skúlanum til at skifta orð um, hvussu skúlin arbeiðir við fólkaræði í og uttan fyri floksstovuna.

Tíð: 2 tímar

Pulsmáting av gerandisfólkaræði er eitt amboð til tykkara, sum lærarar og leiðarar, til at kanna vavið av demokrati í tykkara námsfrøðiliga arbeiði við næmingunum, eins væl og hvør menning er neyðug.

Venjingin stuðlar sjálvhugsan, bæði hvør sær og felags, um fólkaræði og virknan borgaraskap í einum breiðari høpi.
Meðan hini amboðini savna seg um næmingaluttøku, stuðlar pulsmátingin sjálvhugsan í vanliga arbeiðinum hjá skúlanum við fólkaræði, bæði í og uttanfyri flokshølinum.

Grundað á úrslitini frá pulsmátingini kann íblástur til ítøkiligar arbeiðshættir at styrkja næmingaluttøku og ávirkan finnast í øðrum parti av hesum verki. Pulsmátingin kann endurtakast sum eitt uppfylgjandi amboð til næmingaluttøku og harvið veita kunning um, hvussu átakið hevur ment tína mannagongd.

## LEIÐBEINING

### Um amboðið

Amboðið er sett saman av 24 útsagnum, sum lærararnir mugu hugsa og meta um. Tey samlaðu stigini eru pulsmátingin. Tí hevur amboðið tvey mál:

1. at taka stig til professionella sjálvhugsan millum leiðarar og lærarar
2. at leiðslan fær vitan um, hvar tað gevur meining at styrkja ella menna námsfrøðiliga arbeiðið við virknum borgaraskapi og kritiskari hugsan hjá øllum næmingum.

Ein av styrkjunum í amboðnum er, at tað kann beina professionella áhugan hjá leiðslu og lærarum ímóti demokratiska vavinum í námsfrøðiliga arbeiðinum við næmingunum. Á sama hátt stimbrar amboðið kjakið um, hvussu tín skúli skilir og nýtir gerandisdemokrati. Hetta kann hava eggjandi ávirkan á bæði lærarar og leiðslu til at taka stig til eina gongd av menning ella broyting, sum er ætlað at styrkja gerandisdemokrati á útbúgvingarstovnum og virknan samognarskap millum næmingarnar.

Tað er umráðandi at útfyllingin av oyðublaðnum til nýtslu av pulsmátingini ikki er ein sjálvstøðug venjing; hon má vera fylgd av samrøðu og kjaki (sí stig 3 niðanfyri). Tað er akkurát í felags áskoðan og kjaki hjá lærarunum, sum kyknar av tilvitaðum tvítýddum útsagnum í oyðublaðnum, at ein øking hendir í professionella áhuganum at arbeiða við gerandisdemokrati og virkna borgaraskapinum hjá næmingunum í flokshøli, kjakbólki og í øðrum sosialum virksemi og tilboðum hjá skúlanum.

*Heldur fram*

*Framhald frá undanfarnu síðu*

**Soleiðis gert tú:**

**1. stig:** Set *Pulsmáting av gerandisdemokrati* á dagsskránna til starvsfólkafund (umleið 45 min.). Útskriva eitt eintak av *Oyðublað til pulsmáting av gerandisdemokrati* til hvørt starvsfólk.

**2. stig:** Læt øll starvsfólkini (eisini leiðslu) útfylla oyðublaðið hvør sær og legg stigini saman (10 min.).

**3. stig:** Fylg einstøku úrslitunum við at nýta Open Space venjingina (25 min.).

A. Rudda gólvið og hong trý pappír upp í trý horn í rúminum. Á pappírunum stendur, “í minni mun”, “í ávísan mun” og “í størri mun”.
B. Leiðslan velur eitt ávíst tal av útsagnum frá spurnablaðnum. Eitt umboð fyri leiðsluna hevur leiklutin sum fundarstjóri og lesur útsagnirnar upp - eina í senn.
C. Starvsfólkini stilla seg sjálv í tey trý hornini, alt eftir hvat tey meta um útsagnirnar.
D. Tá starvsfólkini hava funnið uppá pláss, spyr fundarstjórin tey, hví tey hava valt hornið, har tey standa.
E. Meðan starvsfólkini lurta eftir hvørjum øðrum, kunnu tey ‘atkvøða við beinunum’; hvørt starvsfólk hevur møguleikan at broyta hugsan og flyta til eitt annað “horn”.

**4 stig:** Leiðsluumboðið/fundarstjórin, tekur munnliga saman um við at vísa á úrslitið av venjingini, og hvat skal kannast nærri (10 min.).

**5 stig:** Leiðslan savnar tey einstøku svaroyðubløðini saman, so hon kann arbeiða meira skipað við hesum upplýsingunum og fylgja pulsmátingini. Endamálið er at kunna vegleiða um, hvussu námsfrøðiliga arbeiðið í framtíðini skal leggjast til rættis við virknum borgaraskapi og demokratiskari mentan á stovninum.

**Oyðublað til pulsmáting av gerandisdemokrati**

Í oyðublaðnum niðanfyri, mást tú fyri hvørja útsøgn avgera, um tú ert samdur við útsøgnina “í minni mun”, “í ávísan mun” ella “í størri mun”. Svarið hjá tær er grundað á tína meting sum ein professionellur.

Fleiri av útsagnunum eru tvítýddar. Tær eru orðaðar til at fáa teg at umhugsa tína mannagongd í egnari undirvísing og demokrati í tínum skúla. Gerandisdemokrati í undirvísing og annað virksemi/tilboð í skúlanum eru fylt við tvístøðum og ymiskum sjónarhornum, sum lærarar og leiðsla virkið mugu hava til viðgerðar. Tí loysir tað seg at tosa saman við starvsfelagarnar um útsagnirnar aftaná.

Tað er umráðandi at tú fyllir oyðublaðið út kronologiskt.

Fyll oyðublaðið út og máta pulsin av gerandisdemokrati í tínum undirvísingarstovni.



| Grundað á tína professionellu meting, hvønn mun ert tú samdur við fylgjandi útsagnum: | |
|---|---|
| 1. Næmingar skulu hjálpa til at velja, hvussu teir ávirka hvønn annan í skúlaflokki og í kjakbólki. | ☐ Í minni mun<br>☐ Í ávísan mun<br>☐ Í stóran mun |
| 2. Tað er umráðandi at skapa støður, har næmingarnir møta hvørjum øðrum, bæði har teir eru samdir, og har teir eru ósamdir. | ☐ Í minni mun<br>☐ Í ávísan mun<br>☐ Í stóran mun |
| 3. Eg eggi ofta næmingunum hjá mær at fara í bólk saman við onkrum, tey ikki hava arbeitt saman við fyrr. | ☐ Í minni mun<br>☐ Í ávísan mun<br>☐ Í stóran mun |
| 4. Eg eggi næmingunum hjá mær til at vísa umhugsni fyri hvørjum øðrum og at taka øll í flokkinum við til sosialar hendingar. | ☐ Í minni mun<br>☐ Í ávísan mun<br>☐ Í stóran mun |
| 5. Tá onkur vísir eintáttaðan ella neiligan atburð ímóti øðrum, kanni eg, hvat er aftanfyri sjónarmiðið. | ☐ Í minni mun<br>☐ Í ávísan mun<br>☐ Í stóran mun |
| 6. Eg vísi áhuga fyri óvæntaðum og øðrvísi svarum, tá ið eg seti flokkinum spurningar. | ☐ Í minni mun<br>☐ Í ávísan mun<br>☐ Í stóran mun |
| 7. Eg loyvi ofta næmingunum at kjakast um umstrídd evni. | ☐ Í minni mun<br>☐ Í ávísan mun<br>☐ Í stóran mun |
| 8. Sum lærari havi eg felags ábyrgd fyri at kunna næmingarnar um demokratisku rættindi og møguleikar teirra. | ☐ Í minni mun<br>☐ Í ávísan mun<br>☐ Í stóran mun |
| 9. Eg hugsi nógv um nær og hvussu næmingar skulu viðfarast ymiskt. | ☐ Í minni mun<br>☐ Í ávísan mun<br>☐ Í stóran mun |
| 10. Eg eri tilvitað/-ur um ikki at eyðmerkja einkultar næmingar sum umboð fyri felagsskapir, hugburðir ella samleikar (fátæk/muslimar/ larmandi). | ☐ Í minni mun<br>☐ Í ávísan mun<br>☐ Í stóran mun |
| 11. Eg haldi tað vera trupult at tosa við starvsfelagar um, hvussu vit handfara viðkvom og umstrídd evni í gerandislívinum. | ☐ Í minni mun<br>☐ Í ávísan mun<br>☐ Í stóran mun |

| Í hvønn mun heldur tú at skúlin/deildin hjá tær livir eftir fylgjandi: | |
|---|---|
| 12. Vit tryggja, at allir næmingar uppliva, at teir eru partur av felagsskapinum. | ☐ Í minni mun<br>☐ Í ávísan mun<br>☐ Í stóran mun |
| 13. Okkara undirvísing og skúlamentan loyvir næmingum virkið at taka lut í avgerðum. | ☐ Í minni mun<br>☐ Í ávísan mun<br>☐ Í stóran mun |
| 14. Allir næmingar eru vælkomnir til at taka lut í sosialum virksemi, men vit taka ikki serlig atlit til t.d. kyn, trúgv ella seksualitet. | ☐ Í minni mun<br>☐ Í ávísan mun<br>☐ Í stóran mun |
| 15. Vit kjakast javnan um, hvussu vit kunnu arbeiða við demokrati og atfinningarsamari hugsan í undirvísing eins væl og gerandislívi í skúlanum. | ☐ Í minni mun<br>☐ Í ávísan mun<br>☐ Í stóran mun |
| 16. Okkara skúli samstarvar tvørfakliga við øll, frá áhugabólkum í nærum- hvørvinum til stórar felagsskapir fyri at økja um áhugan hjá næmingu- num og at luttaka virkið í samfelagnum. | ☐ Í minni mun<br>☐ Í ávísan mun<br>☐ Í stóran mun |
| 17. Tá næmingurin ikki er komin til aldur, biðja vit foreldrini hjálpa til við loysnini av serstøkum trupulleikum í gerandislívinum. | ☐ Í minni mun<br>☐ Í ávísan mun<br>☐ Í stóran mun |
| 18. Vit hava eina greiða strategi fyri, hvussu vit handfara niðrandi, áleypandi ella diskriminerandi mál og atburð. | ☐ Í minni mun<br>☐ Í ávísan mun<br>☐ Í stóran mun |

| Í hvønn mun hóska fylgjandi útsagnir til tín skúla/tína deild? | |
|---|---|
| 20. Næmingar í okkara skúla vita, hvønn teir skulu venda sær til og hvat teir skulu gera, um teir kenna á sær at onkur hevur gjørt seg inn á teir ella hevur gjørt teimum mismun. | ☐ Í minni mun<br>☐ Í ávísan mun<br>☐ Í stóran mun |
| 21. Í okkara skúla eru tað altíð teir mest uppfinningarsomu og væl dámdu næmingarnir, sum stilla upp til næmingaráðið. | ☐ Í minni mun<br>☐ Í ávísan mun<br>☐ Í stóran mun |
| 22. Bólkurin av lærarum í okkara deild er ymisligur og samansettur av nógvum ymiskum fólkum tvørtur um aldur, kyn, seksualitet og mentan. | ☐ Í minni mun<br>☐ Í ávísan mun<br>☐ Í stóran mun |
| 23. Okkara skúli mennir førleikan hjá øllum næmingum at vera partur av einum samfelag, har vit geva hvørjum øðrum gætur. | ☐ Í minni mun<br>☐ Í ávísan mun<br>☐ Í stóran mun |
| 24. Okkara skúli mennir allar næmingar til sjálvstøðugar og atfinningarsamt hugsandi einstaklingar. | ☐ Í minni mun<br>☐ Í ávísan mun<br>☐ Í stóran mun |

## Stigskipan

| Staðfestingar | Í minni mun | Í ávísan mun | Í stóran mun | Stig |
|---|---|---|---|---|
| Staðfesting 1 | 0 | 1 | 2 | |
| Staðfesting 2 | 0 | 1 | 2 | |
| Staðfesting 3 | 0 | 1 | 2 | |
| Staðfesting 4 | 0 | 1 | 2 | |
| Staðfesting 5 | 0 | 1 | 2 | |
| Staðfesting 6 | 0 | 1 | 2 | |
| Staðfesting 7 | 0 | 1 | 2 | |
| Staðfesting 8 | 0 | 1 | 2 | |
| Staðfesting 9 | 0 | 1 | 2 | |
| Staðfesting 10 | 0 | 1 | 2 | |
| Staðfesting 11 | 2 | 1 | 0 | |
| Staðfesting 12 | 0 | 1 | 2 | |
| Staðfesting 13 | 0 | 1 | 2 | |
| Staðfesting 14 | 2 | 1 | 0 | |
| Staðfesting 15 | 0 | 1 | 2 | |
| Staðfesting 16 | 0 | 1 | 2 | |
| Staðfesting 17 | 0 | 1 | 2 | |
| Staðfesting 18 | 0 | 1 | 2 | |
| Staðfesting 19 | 2 | 1 | 0 | |
| Staðfesting 20 | 0 | 1 | 2 | |
| Staðfesting 21 | 2 | 1 | 0 | |
| Staðfesting 22 | 0 | 1 | 2 | |
| Staðfesting 23 | 0 | 1 | 2 | |
| Staðfesting 24 | 0 | 1 | 2 | |
| **Í alt** | | | | |

### Meting

**0-16 stig:** Lágt støði av professionellum áhuga fyri námsfrøðiliga arbeiðinum í at fremja virknan borgaraskap millum næmingarnar.
Eitt gott stað at byrja við professionellu flokkingini og menningini av námsfrøðiligum arbeiði við gerandisdemokrati í undirvísing og øðrum virksemi í skúlanum, eins og at arbeiða við borgaraskapinum hjá næmingunum, er at kanna tínar egnu mannagongdir nærri.

**17-32 stig:** Hampiligt støði av professionellum áhuga fyri námsfrøðiliga arbeiðinum í at fremja virknan borgaraskap millum næmingarnar.

**33-48 stig:** Høgt støði av professionellum áhuga fyri námsfrøðiliga arbeiðinum í at fremja virknan borgaraskap millum næmingarnar.

# 1.d. Verulig ávirkan

Hetta amboðið er ment av Amondo. Sí meira á síðu 2.

Amboðið kann brúkast av einum toymi til at stuðla eini felags hugsan um virksemið hjá næmingunum í undirvísingini, men eisini til sjálvhugsan um, hvussu næmingar kunnu fáa ávirkan í einum størri høpi.

Tíð: 1 tími



# Toymisvenjing í sjálvhugsan

## Verulig ávirkan

**Hvat er venjingin um?** Málið er, at tit sum toymi hugsa um, nær tit geva næmingunum veruliga ávirkan, og nær tit uppliva, at tað vera eina avbjóðing.

**Hvussu:** Gev hvørjum luttakara eitt avrit av oyðublaðnum. Hvør sær hugsa tit um spurningarnar niðanfyri:

- Hvar loyvi eg longu nú næmingunum veruliga ávirkan?
- Nær eitist eg at taka næmingarnar við, ella nær manipuleri eg næmingarnar til at vilja nakað ávíst?
- Hvar kann eg taka næmingarnar meira við?
- Hvar kann eg geva næmingunum størri ávirkan?

Tosið saman í toyminum um, hvørja sjálvhugsan tit kundu hugsað tykkum at deilt tykkara millum.



## Lyklaorð

Skrivið viðmerkingar niður frá tykkara felags kjaki í toyminum:

# 1.e. Kanning av møguleikum hjá næmingum at luttaka og ávirka

Hetta amboðið er ment av Skolverket. Sí meira á síðu 2.

Hetta amboðið kann skapa grundarlagið hjá einum toymi at kanna sína verandi mannagongd til at fáa næmingar við at taka avgerðir. Meiningin er, at kanningin skal halda fram í eina tíð. Kanningin kann sostatt vera við til at geva eitt meira nágreiniligt íkast til hinar reflektiónsvenjingarnar í verkinum.

Tíð: Í minsta lagi 10 tímar

## HVUSSU

### A. Planlegging og fyrireiking

Legg ætlan um eina kanning av møguleikum hjá næmingum til at luttaka og ávirka í tínari undirvísing. Virksemið miðar ímóti at geva tær sum lærara innlit í nær, hvar, hvussu, og við hvørjum endamáli næmingarnir hava fingið møguleikan at luttaka. Kanningin staðfestir við sjálvhugsan, hvussu næmingaluttøka sær út, og tín egna leiklut í at fremja hana.
Legg ætlanir saman í toyminum um tíðarskeiðið, har kanningin skal fara fram, og hvussu hon skal fara fram og verða skjalprógvað. Kanningin kann vera so leingi, sum tit halda tað vera neyðugt til at savna upplýsingar, men hon má vera minst ein dag.

Kanningin eigur at fevna um hesi evni:

- Nær sleppa fáa næmingarnir at luttaka í og at ávirka tína undirvísing?
- Hvar sleppa næmingarnir at luttaka í og at ávirka tína undirvísing?
- Hvussu fáa næmingarnir (og hvussu taka teir) møguleikan at luttaka í og ávirka tína undirvísing?
- Hvat er endamálið við at lata næmingarnar luttaka í og ávirka tína undirvísing?

### B. Ger virksemið liðugt

Ger kanningina, tit løgdu ætlanir um í stigi A lidna. Samanlíkna so úrslitini av kanningini grundað á hesi fýra sjónarhorn: Nær, hvar, hvussu, og til hvat endamál eru næmingarnir førir fyri at luttaka og ávirka tína undirvísing. Enda við sjálvhugsan um, hvussu tað sær út og hvørjar møguleikar og brek tú sært í háttunum, sum næmingarnir kunnu luttaka og ávirka tína undirvísing. Skriva viðmerkingar niður og nýt hesar sum grundarlag til stig C.

### C. Felags uppfylging og kjak

Ger eina felags uppfylging, grundaða á tína egnu sjálvhugsan og viðmerkingar frá stigi B, har tit kjakast um úrslitið av kanningini. Greiðið frá og kjakist um, hvat tit funnu útav fyri hvørt av teimum fýra sjónarhornunum. Enda við at kjakast um hvørji menningarøki tit síggja, og hvussu tit kunnu halda fram at arbeiða við teimum.

# 2.

## Amboð til at menna mannagongd



## 2.a. Inngangur

Annar partur inniheldur eina samanseting av ítøkiligum venjingum til at menna tína mannagongd at styrkja næmingaávirkan og luttøku. Fyrst finnur tú eitt yvirlit við dømum av ymiskum møguleikum til at økja ávirkanina hjá næmingunum á undirvísingina og skúlan sum heild: Sí **amboð 2.b**. Yvirlitið kann hjálpa til sum ein skrá við hugskotum, tá tit leggja ætlanir um ymiskar royndir í samband við økta luttøku.

Annar partur inniheldur eisini fleiri amboð til sjálvhugsan og uppíkoming – eisini ein áminnislista, sum kann víðkast við tínum egnu hugskotum út frá tí, tú hevur lært saman við næmingunum. At enda hevur annar partur tveir hættir at eftirmeta eitt undirvísingarskeið, har dentur verður lagdur á uppíkoming og luttøku.

Tá tú gert av at arbeiða við at styrkja um næmingaluttøku, kanst tú samanbera tað við onnur sløg av mennandi skúlaverkætlanum. Hetta meinast við, at tørvur er á góðari stýring, um tú vilt tryggja, at tíni mál skulu viðvirka til broyttar mannagongdir í skúlanum. Tí eru nakrir reflekterandi spurningar at finna í endanum av hesum verki, sum kunnu stuðla tær í tínum arbeiði, viðvirka til eitt áhaldandi yvirlit og hjálpa tínum arbeiði í at styrkja um næmingaluttøku.



# 2.b. Yvirlit - Møguleikar fyri øktari næmingaávirkan í skúlanum

Hetta amboðið varð ment av Styrelsen for Undervisning og Kvalitet. Sí meira á síðu 2.

Hetta amboðið verður brúkt til einstaklingar ella bólka-reflektiónir.

Tíð: 2 tímar

## Hvussu

Yvirlitið gevur tær fleiri dømi um ymiskar møguleikar at økja ávirkanina hjá næmingunum í undirvísingini og skúlanum sum heild. Brúka yvirlitið til reflektiónirnar hjá tær ella tínum bólki um verandi mannagongdir ella ynski um framtíðar mannagongdir viðvíkjandi næmingaluttøku. Yvirlitið kann hjálpa til sum ein skrá við hugskotum, tá tit leggja ætlanir um ymiskar royndir í samband við økta luttøku. Listin er ikki endaligur, og tú kanst væl seta tínar egnu hugsanir á.

## Í undirvísing

### Innihald, tilfar og virksemi

**Næmingar kunnu fáa ávirkan á:**

- Hvar ymisk skeið eru løgd í ársætlanini.
- At velja temu og evni, sum flokkurin skal arbeiða við gjøgnum árið.
- Uppskot og val av tekstum, økjum til serkunnleika, modellum, teknimyndagerðum, greinum, næmingaframleiðslu, verkætlanum ella evnum, sum kunnu nýtast til royndir/próvtøku.
- Uppskot til ítøkiligt innihald í undirvísingini viðvíkjandi teksti, ljóði og myndum, royndum, framleiðslu ímóti endanum av skeiðinum, avtalum við felagsskapir rundanum, útferðir o.s.fr.
- Fyrireiking og framløgu av venjingum og uppgávum (dansi ella upphitingar-venjing í ítrótti, ein hátt at venja førleika í støddfrøði, fyrireiking av spurningum til eina professionella spurna-kapping, o.s.fr.).
- At síggja samband millum endamálið við skeiðnum

### Arbeiðshættir

- Næmingarnir kunnu ávirka um arbeiðið verður gjørt sjálvstøðugt, tvey og tvey ella í smærri/størri bólkum.
- Næmingar kunnu hjálpa at velja skipanina av skeiði-num (til dømis um tey eru verkætlanarskipað ella fakskipað skeið).
- Næmingar kunnu skipa fyri "heilasteðgum" í flokshøli-num og velja venjingarnar.
- Næmingar kunnu hava ávirkan á, hvørjir greiningarhættir, bókligir hættir og hvørji úrslit vera nýtt í undirvísingini.

### Persónliga, bókliga og sosiala menningin hjá næminginum

- Næmingurin kann vera við til at seta persónlig, professionell og sosial mál fyri eitt skeið ella longri tíðarskeið.
- Næmingurin tosar støðugt við læraran um uppfylging av málunum.
- Næmingurin luttekur í at leggja eina ætlan fyri, t.d. at bøta um uppmøting, tolsemi, avrik, treysti, áhaldni, o.s.fr.
- Næmingurin er við í at gera av, hvat slag av framhaldandi afturboðan og leiðbeining hann vil hava.
- Næmingarnir kunnu takast við í kjak um, hvussu teir kunnu menna sítt besta byrjanarstøði at fáa vitan og evni gjøgnum undirvísingina.





# Í skúlanum sum heild

## Í skúlaflokkinum

Til dømis kann næmingurin hava ávirkan á:

- Sosial- og vælverutiltøk.
- Innrætting av flokshølinum.
- Reglur og virðir fyri flokkin.

## Foreldrasamstarv

Skúlin kann styrkja næmingaávirkan við t.d.:

- At taka næmingarnar við í at leggja ætlanir um foreldra-lærarafundir.
- At biðja næmingarnar koma við ískoyti til innihald, framløgu av uppgávum, o.s.fr. til foreldra-lærarafundir.
- At hava fyrireikandi samrøðu við einstaka næmingin, áðrenn samrøðuna við foreldrini.
- Framhaldandi at hava næmingaframleidd yvirlit til foreldrini um, til dømis eitt komandi ella gjøgnumført skeið.

## Næmingaráð

Næmingar kunnu hava ávirkan á eitt nú:

- Hvussu flokshølið skal síggja út.
- Reglur og nýtslu av innandura- og uttanduraøkjum.
- Sosialar hendingar og virksemi.
- Læruumhvørvið.
- Reglur og prinsipp í skúlanum.
- 

# 2.c. Menningarvirksemi, sum virkar fyri næmingaluttøku

Hetta amboðið er ment av Skolverket.
Sí meira á síðu 2.

Hetta amboðið kann brúkast av toymum til at umskapa hugsanir um næmingaluttøku til nakað ítøkiligt, sum kann blíva roynt og síðani eftirmett.

Tíð: 4 skúlatímar

## HVUSSU

Skapa fyrst eitt yvirlit yvir arbeiðshættirnar, sum tú heldur stuðla næmingaluttøku og ávirkan, og sum tú longu arbeiðir uppá í toyminum. Um tað er neyðugt, so fá tær íblástur til ítøkilig hugskot til hini amboðini, sum eru nevnd í øðrum parti. Hygg til dømis at yvirlitinum í amboði 2 b við dømum um ymiskar møguleikar at økja ávirkanina hjá næmingunum á undirvísingina og skúlan sum heild.

Hugsa um hesar spurningarnar:

- Hvussu kunnu næmingunum at orða seg á ymiskan hátt í undirvísingini og kenna seg tiknar við og ávirka læringina hjá sær?
- Í hvørjum samanhangi hava næmingarnir val í undirvísingini í dag? Hvørjar eru avbjóðingarnar í sambandi við valini? Hvussu kanst tú í toyminum arbeiða upp á eitt nú hierarki hjá næmingum og næmingar við serligum tørvi?
- Hvørjar avbjóðingar sært tú sum týðandi fyri arbeiðið? Grundað á undanfarna svar, hvørjar broytingar kunnu tit sum eitt toymi gjøgnumføra fyri at bøta um umstøðurnar fyri næmingaluttøku og ávirkan?

**Planlegging og fyrireiking**
Planlegg eitt undirvísingarvirksemi, sum økir næmingaluttøkuna í undirvísingini. Planlegg undirvísingarvirksemið grundað á tíni svar upp á spurningarnar omanfyri.

**Fullfíggjan av virkseminum**
Gjøgnumfør tað undirvísingarvirksemið, sum tit høvdu planlagt saman. Kanska tú skrivar niður, antin meðan tímin er ella beint aftaná. Gev tær gætur um hvat riggaði, hvat ikki riggaði, og hvat tú hevur lagt til merkis viðvíkjandi læring hjá næmingum og tínari undirvísing.

**Felags uppfylging**
Ger eina felags uppfylging grundaða á tíni undanfarnu svar og uppskriftir frá tí lidna undirvísingarvirkseminum. Greiðið frá og tosið saman um, hvussu væl tað gekk.

Byrjið við hesum spurningum:

- Hvat riggaði væl, og hví riggaði tað?
- Hvat riggaði minni væl, og hví mundi tað vera?
- Hvørjar fyrimunir og vansar hava tit funnið við teimum ymisku arbeiðshættunum?
- Hvørjar avbjóðingar hava tit funnið fram til?
- Hvussu kanst tú brúka royndirnar frá tí, tú nú hevur roynt, í víðari undirvísing?

Kjakist um aðrar arbeiðshættir, sum kunnu økja næmingaluttøku og ávirkan í undirvísingini.

# 2.d. Næmingavirksemi sum putlispæl

Hetta amboð er ment av Danske Skoleelever við stuðli frá danska Barna- og Undirvísingamálaráðnum. Sí meira á síðu 2.

Hetta amboðið kann brúkast av einum lærara til at planleggja ella eftirmeta undirvísing - hetta kann verða gjørt við at fáa næmingarnar við.

Tíð: 2 tímar

## Um amboðið

**Putlispælið í undirvísing hevur 8 brot: Mál, innihald, karm, skap, framleiðslu, afturboðan, eftirmeting og tóma brotið. Endamálið við putlispælinum í undirvísing er at fáa eina greiða mynd av hvørjum brotum undirvísing er sett saman av, og hvat tú sum næmingur kanst ávirka. Harafturat kann putlispælið í undirvísing nýtast sum amboð hjá lærarum at leggja ætlanir, tá teir skipa sína undirvísing. Putlispælið í undirvísing vísir, at brotini i undirvísing eru sjálvstøðug, og at tað eru avmarkingar og møguleikar, tá tú leggur ætlanir, fullfíggjar og eftirmetir undirvísingina.**

Tað er ikki endamálið, at øll brotini í putlispælinum um undirvísing altíð skulu nýtast, ella at øll skulu brúkast í senn. Undirvísing er dynamisk, og ymiskt virksemi gevur næmingum høvi at vera við. Tí er tað avgerandi at nýtslan av brotunum í undirvísingini skal geva meining í samband við lærandi sjálvhugsanina hjá læraranum um virksemi og mál.

## Hvussu

Putlispælið um undirvísing kann nýtast áðrenn eitt viðkomandi undirvísingarvirksemi er sett í gongd. Her verður tað nýtt til at fáa greiðu á, hvørji øki av undirvísingini næmingurin kann takast við í. Samstundis kann putlispælið í undirvísing nýtast til at byrja eina samrøðu um, hvat passar til væntanir út frá hesum: Hví eru hesi tey serstøku økini, sum kunnu ávirkast?

Putlispælið í undirvísing kann eisini nýtast til at líta aftureftir og harvið hjálpa okkum afturlítandi at greiða frá, hvørjir partar av undirvísingini hava virka fyri at fáa næmingarnar við.

## Hví

Nýtsla av hesum amboði ger tað sjónligt, hvørjum pørtum undirvísingin er sett saman av. Hetta kann føra til eina økta tilvitsku um, hvussu undirvísing er uppbygd, eins væl og rásarúmið fyri at taka næmingar við. Á hesum grundarlag bjóðar putlispælið í undirvísing næminginum demokratiskt inn í maskinrúmið hjá læraranum í samband við planlegging, fullfíggjan og eftirmeting av undirvísingini.

Putlispælið í undirvísing stuðlar læraranum og samstarvinum hjá lærarum í undirvísing við at geva grundarlag fyri samrøðu um brotini í undirvísing, og hvørji brot kunnu takast við.

## Hvat

Brotini í putlispælinum til undirvísing eru lutfalsliga breitt fevnandi, og kunnu innihalda nógv ymiskt. Niðanfyri finnur tú eina nágreiniliga frágreiðing um ymisku brotini. Til endans í verkinum finnur tú brot, sum tú kanst útskriva og fylla út sjálv/-ur, ella saman við næmingunum.





# TEY 8 BROTINI

## Mál

Tá tað verður tosað um at taka næmingar við í samband við eitt mál, skal tað skiljast sum eitt einstakt, bólka- ella floksmál í ljósinum av endamálinum við formligari undirvísing. Tí er tað ein orðing av nýggjum ella ein minking av einum verandi formligum máli. Sjálvt um næmingarnir fáa møguleika at greiða frá teirra egna máli, er tað neyðugt at tosa um samanhangin av málinum við tí formliga málinum. Málið má sjálvandi vera týdningarmikið fyri næmingin, men tað má eisini vera ein reyður tráður í samband við tann størra samanhangin.

## Innihald

Innihaldsbrotið vísir til tað ástøðiliga tilfarið, ið vil føra til málini fyri undirvísingina. Spurningurin, sum hoyrir til hetta brotið, er hvørjum næmingurin eigur at arbeiða við - skulu næmingarnir til dømis lesa eina stuttsøgu, arbeiða við stavseting í lærubókini ella rætta stílar hjá hvørjum øðrum?

## Karmur

Karmurin er tað brotið, sum leggur dent á umstøðurnar, sum eru nýtiligar í undirvísingini. Hetta er til dømis tíð, tøk høli, møguleikin fyri at læna hoyrn-/sjónhjálpartól, fíggjarligar umstøður, vanligar reglur, o.s.fr. Í hesum brotinum fara næmingar sostatt at vera førir fyri at ávirka tíðarfreistir, har teir skulu arbeiða, hvussu teir fíggja eina verkætlan, o.s.fr. Karmurin er eisini eitt slag av minnislista yvir avmarkingarnar, sum undirvísingin ella skeiðið hevur.

## Skap

Verður arbeiðið gjørt sjálvstøðugt, tvey og tvey ella í størri bólkum? Verður arbeiðið gjørt standandi, liggjandi, sitandi, við ella uttan tónleiki? Krevst rørsla til at gera tað, ella fullkomin friður? Hetta er eitt vældámt brot millum næmingarnar, tí teir sleppa sjálvir at skipa arbeiðið eftir egnum tørvi.

## Úrslit

Øll undirvísing hevur eitt mál ella krav til úrslit. Tað kann vera ein tekning, ein liðug síða í einari støddfrøðibók, ein talva, ein søga ella ein framløga. Framleiðslubrotini leggja dent á tað, sum næmingurin kann/skal framleiða.

## Afturboðan

Afturboðanarbrotið er um, hvat slag av afturboðan eigur at vera ein partur av undirvísingini, og um formlig afturboðan yvirhøvur skal vera ein partur. Afturboðan er skapandi og hevur tí eitt sjónarhorn, sum hyggur frameftir: Hvussu kunnu vit flyta okkum framá hiðani ímóti málinum? Umráðing í samband við hetta brotið kann vera: Eigur næmingurin at fáa einstaka afturboðan ella felags afturboðan frá læraranum? Eiga næmingarnir at geva hvørjum øðrum afturboðan í flokkinum? Skal skipast fyri eini eftirmeting mitt í skúlaárinum fyri at meta um, hvussu flokkurin kann gerast enn betri?



## Eftirmeting

Har afturboðan er skapandi, tekur eftirmeting meira samanum: Hvat hava vit lært? Hvussu gekk tað? Eru vit komin á mál? Næmingar kunnu hava ávirkan á hvussu eftirmetingin eigur at fara fram. Skal t.d. eitt oyðublað nýtast? Eitt Kahoot? Ella kanska ein bólkasamrøða?

## Tóma brotið

Tóma brotið eigur flokkurin. Hvussu tað skal brúkast kunnu bæði lærarar og næmingar gera av. Tóma brotið lýsir eitt tema, sum koyrir saman við formligu undirvísingini. Tað kann innihalda alt. Tað kann vera vælvera, ein fyrispurningur um fleiri heilasteðgir, ósemjuloysn, floksreglur, o.s.fr. Brotið er ætlað sum ein møguleiki hjá flokkinum at geva onkrum gætur, sum verður hildið at hava týdning at leggja dent á, og sum liggur uttanfyri málið fyri formligu undirvísingina.

# 2.e. Sløg av felagsskapum, sum virka fyri næmingaávirkan og luttøku

Hetta amboðið varð ment av **Styrelsen for Undervisning og Kvalitet**. Sí meira á síðu 2.

Hetta amboðið kann brúkast í sambandi við verkætlanir hjá næmingunum og inniheldur eitt ark at lata næmingunum.

Tíð: 2 tímar

## Um amboðið

Tað eru nógvir ymiskir hættir at skipa undirvísing, sum styrkir næmingaávirkan og luttøku. Til dømis kann íblástur finnast í Cooperative Learning structures (samvinnandi læruuppbygging), lestrargrundaðari undirvísing, flóðpedagogikki, CIE-modellinum (Creativity, Innovation, and Entrepreneurship), og fleiri sløgum av fak- og verkætlanararbeiði. Tá tað er fakarbeiði, arbeiða næmingarnir við bókligum ella tvørfakligum evnum, men arbeiðið nýtist ikki at miða ímóti einari verkætlan. Verkætlanararbeiði er eyðkent av, at næmingarnir arbeiða við einum ella fleiri evnum, sum teir partvíst sleppa at velja sjálvir. Orsakað av sínum opna skapi, gevur verkætlanararbeiði næmingunum nógva ávirkan á val av tilfari, arbeiðshátti, framleiðslu, o.s.fr. Hetta kann ofta vera eggjandi fyri teir. Samstundis seta verkætlanararbeiðspláss næmingunum størri krøv til sjálvstøðugar uppgávuloysnir, áhaldandi yvirlit, evni til at samstarva, o.s.fr. Treytað av næmingabólkinum, má lærarin tí tryggja neyðugan og framhaldandi stuðul til næmingarnar, at gera seg lidnar við verkætlanararbeiðið.

Á næstu síðu kunna vit tykkum um *Verkætlanarpílin*, sum er eitt amboð til verkætlanararbeiði. Verkætlanarpílurin er valdur, tí hann er hugskygdur at nýta, og hann kann nýtast tvørtur um útbúgvingarøki. Amboðið er ein stigvís leiðbeining til lærarar og næmingar í samband við undirvísing í skeiðum í verkætlanararbeiði og ein mynd, sum eisini er í einari útgávu, sum er tøk at skriva út í endaverkinum.



## Verkætlanarpílurin

**Soleiðis gert tú:**

- Tín bólkur fær eitt pappír við pílinum.
- Í innara rundinginum skrivar tú yvirskipaða málið (til dømis, *betri sosialt umhvørvi í skúlanum*)
- Í mittasta ringin skrivar tú serlig mál/virksemi (til dømis *ítróttadagur*)
- Í tí uttasta ringinum kanst tú greiða frá ítøkiligu karmunum fyri virkseminum: Tíð, stað, o.s.fr. (til dømis *bøurin nær við skúlan*). Tú kanst skriva á alt pappírið og skriva út um kantin á rundinginum.
- Pílurin skal vera býttur upp í natúrlig stig (súlur), til dømis sum víst her við appilsingulum liti. Skriva nú uppgávurnar, tú skalt loysa í verkætlanini, niður í stigini. Set tær í rætta raðfylgju. Tað vil siga, at uppgávurnar, sum tú skalt loysa fyrst (til dømis at fyrireika ein ítróttadag), skulu vera í fyrsta stiginum (longst burtur frá rundinginum). Uppgávurnar, sum skulu loysast til síðst í verkætlanini (til dømis fremjanin av ítróttadegnum), skulu setast fremst á pílinum.
- 




### Hvørt **stig** hevur ymisk eyðkenni: Eyðkenni fyri framgongd / Møguleikar / Avbjóðingar

- Finn eitt eyðkenni fyri framgongd fyri hvørt stig (til dømis, kann eyðkennið fyri framgongd fyri ein ítróttadag vera ærligt spæl og gott huglag).
- Kjakist um, og greiðið frá, hvørjar gerðir og hvat virksemi kann hjálpa tykkum á veg við verkætlanini (til dømis fíggjarligur stuðul).
- Tosið um møguligar avbjóðingar og kjakist um, hvussu tit loysa tær (til dømis ringt veður).
- Eftirmeting: Enda verkætlanina við at eftirmeta mannagongdina og úrslitið - helst skrivliga, so tú hevur tað til eina aðru ferð. Eftirmetingin gevur tær vitan, sum tú kanst brúka í komandi verkætlanum. Eftirmet framgongd, mál og tíðarætlan við at brúka hesar spurningar:
  - Hvat gjørdu vit?
  - Hvat riggaði væl?
  - Hvat riggaði ikki ella riggaði ikki so væl?
  - Hvat krevst fyri at fáa næstu verkætlanina at eydnast (eisini)?

# 2.f. Tíðarætlan fyri virksemismannagongdir

Hetta amboðið er ment av Amondo. Sí meira á síðu 2.

Hetta amboðið kann brúkast av einum toymi ella einum einstøkum lærara til at fyrireika ítøkilig skeið, har næmingarnir eru við.

Tíð: 1 tími

## Hvussu

Um tú vilt fáa tínar næmingar við í onkra ávísa mannagongd ella okkurt virksemi, kann oyðublaðið brúkast til eitt skipað kjak um karmarnar fyri ávirkan - hví vilt tú hava næmingarnar við, í hvørjum økjum kunnu teir vera við, og hvussu kann hetta blíva umskapað til nakað ítøkiligt? Enda við at leggja eina ætlan fyri nær og hvussu tú vilt fylgja upp á luttøkuna í tilgongdini.

### Endamálið við virkseminum:

### Hvat kunnu næmingarnir hava ávirkan á? (til dømis, evni, undirvísingarskeið, fak, planlegging av legu, planlegging av foreldra-lærarafundi, innrætting av flokshøli):

## Mannagongd fyri virksemi:

| | |
|---|---|
| Karmur í flokkinum | Hvussu eru karmarnir? (t.d. tímar, lærumál)<br><br>Hvat kunnu næmingarnir ávirka? (t.d. arbeiðshátt, bólk, evni, innrætting av flokshøli) |
| Virksemi í flokkinum | |

### Hvussu fylgja vit upp í toyminum?

# 2.g. Áminningarlisti til virksemismannagongdir

Hetta amboðið er ment av Amondo. Sí meira á síðu 2.

Amboðið er til læraranna egnu ella felags reflektión og kjak um teirra støðuga arbeiði við næmingaluttøku.

## Hvussu

Áminningarlistin hevur nakrar grundleggjandi reglur, sum tú skalt minnast til, tá tú arbeiðir sum lærari/toymi fyri at økja um ávirkan og luttøku hjá næmingum. Tú kanst brúka listan í tínum framhaldandi arbeiði við næmingaluttøku - bæði í sambandi við fyrireiking og eftirmeting av tilgongdum. Áminningarlistin kann prinast út og heingjast upp. Listin er ikki endaligur, og tú kanst væl seta tínar egnu hugsanir á.

## Áminningarlisti

- til at leggja ætlanir fyri næmingavirksemi

- [ ] Endamálið við virkseminum má vera greitt
- [ ] Greiðar lýsingar av tí, ið longu er avgjørt: Greiðar orðingar um tað, sum næmingar kunnu ávirka og tað, sum lærarin hevur ábyrgdina av
- [ ] Serstøk evni, sum næmingarnir hava áhuga fyri
- [ ] Næmingarnir mugu hava neyðuga vitan um evnið, fyri at vera ein partur av upplýstum kjaki
- [ ] Veruligur møguleiki fyri ávirkan
- [ ] Opin, forvitin háttur at lurta eftir sjónarmiðunum hjá næmingunum
- [ ] Afturboðan til næmingarnar eftir virksemið. Hvat er nátt við virkseminum?
- [ ] Gerðir aftan fyri orð
- [ ] Toymisstuðul



# 2.h. Hugskotsmenning - Speakers' Corner

Hetta amboðið er ment av Amondo.
Sí meira á síðu 2.




Hetta amboðið kann brúkast av lærarum, sum vilja fáa næmingar sínar við til at menna hugskot til læruskeið.

Floksvenjing: Ítøkilig, skrivlig, munnlig

Tíð: 2 tímar

Endamálið við hesum amboði er at fáa næmingarnar við til at menna hugskot til eitt læruskeið við íblástri frá tilfari og myndum. Síðani skulu næmingarnir grundgeva fyri og ímóti teimum ymsu hugskotunum framman fyri flokkinum.

## Hvussu

### Fyrireiking

Finn tilfar/myndir/leikgripir/notat við lyklaorðum sum stuðla evnið, sum næmingarnir skulu menna hugskot til (t.d. skeið í søgu). Skriva uppskot um arbeiðshættir (t.d. bólkar ella einstaklingar) og um, hvussu framløgan skal vera (t.d. fyrilestur ella talva). Finn ein kassa ella okkurt líknandi, sum næmingarnar kunnu brúka til at standa á í Speakers' Corner.

Kopiera næmingaarkið.

### Í skúlaflokkinum

#### 1. Greið frá

Sig flokkinum frá, at tey skulu hjálpa til við hugskotum til, hvussu eitt læruskeið skal setast saman, og at tey skulu grundgeva fyri og ímóti teimum ymsu hugskotunum. Byrja við at kunna næmingarnar um skeiðið og gev teimum nøkur dømir. Um tú hevur hug, kanst tú biðja næmingarnar hugsa um undanfarin skeið fyri síðan at meta um, hvørji teimum dámdu best og hví. Legg fram lærumálini og rammurnar fyri næmingunum.

#### 2. Hugskotsputlispæl

Být flokkin upp í bólkar við umleið fýra næmingum í hvørjum. Gev hvørjum bólki tilfar/myndir/leikgripir/notat við leiðorðum, sum stuðla læruskeiðnum, sum næmingarnir skulu koma við hugskotum til. Hvør bólkur má semjast um samansetingar av trimum lyklaorðum, tilfari ella myndum, sum greiða frá einum hugskoti. Bólkarnir kunnu eisini koma við fleiri hugskotum.



#### 3. Speakers Corner

Gev hvørjum bólki eitt næmingaark.

Hvør bólkur velur sítt besta hugskot og fyrireikar 1-2 minuttir av grundgevingum fyri sínum hugskoti grundað á spurningarnar í næmingaarkinum:

- Hvat er hugskotið um?
- Hví er hugskotið gott - tríggjar grundgevingar?
- Hvør fær fyrimun av hugskotinum?
- Hvat skal til, fyri at hugskotið skal eydnast?

Bólkarnir velja eitt umboð, sum skal leggja hugskotið fram fyri restina av flokkinum. Næmingarnir taka tørn at standa á kassanum og leggja grundgevingarnar fram. Skriva hugskotini á talvuna.

#### 4. Tey næstu stigini

Greið næmingunum frá, hvussu hugskotini fara at vera brúkt, og hvussu tú vilt raðfesta og gera av, hvørjum hugskotum tit fara at arbeiða við.

# Næmingaark

Hvat er hugskotið um?

Partur Hví er hugskotið gott - tríggjar grundgevingar?

Hvør fær fyrimun av hugskotinum?

Hvat skal til fyri at hugskotið skal eydnast?

# 2.i. Bygg og eftirmet eitt hugskot

Hetta amboðið er ment av Amondo.
Sí meira á síðu 2.



Hetta amboðið kann brúkast av einum lærara, sum ynskir at fáa næmingarnar við til at menna hugskot til læruskeið.

Floksvenjing: Skapandi, munnlig, skrivlig, møguliga uttandura

Tíð: 2 tímar

Endamálið er at lata næmingar koma við hugskotum og uppskotum til eitt læruskeið við at brúka LEGO ella annað skapandi tilfar, og síðani kjakast fyri ella ímóti teimum ymisku hugskotunum í flokkinum.

## Hvussu

### Fyrireiking

Kopiera næmingaarkið og fyrireika kreativa tilfarið.

### Í skúlaflokkinum

#### 1. Greið frá

Sig flokkinum frá, at tey skulu hjálpa til við hugskotum til, hvussu eitt læruskeið skal setast saman, og at tey skulu grundgeva fyri og ímóti teimum ymsu hugskotunum. Byrja við at kunna næmingarnar um skeiðið og gev teimum nøkur dømir. Um tú hevur hug, kanst tú biðja næmingarnar hugsa um undanfarin skeið fyri síðan at meta um, hvørji teimum dámdu best og hví. Kunna næmingarnar um lærumálini og greið frá verkliga partinum í skeiðnum.

#### 2. Bygg hugskotið upp

So vítt til ber, eigur hvør næmingur at fáa sama tilfar, t.d., LEGO ella líknandi. Gev næmingunum uml. 10 min í friði at byggja. Til dømis:

- Hvussu sær eitt fullkomið læruskeið út? Hvat gera vit? Hvør ger hvat? Hvar eru vit? Hvussu læra vit?
- Hvussu sær tann fullkomna skúlavikan út?

Tú kanst út frá málbólkinum meta um, hvørt spurningarnir kunnu brúkast í sínum verandi líki. Ella um tú mást orða teir av nýggjum - ella kanska leggja onkrar stuðlandi spurningar aftrat, so sum hvørji evni, hvat slag av uppgávum, hvar vit eru, o.s.fr.

Næmingarnir fara í bólkar við umleið fýra næmingum í hvørjum, og teir skiftast um at siga frá sínum hugskotum.

Næmingarnir savna síni fýra hugskot saman til eitt (í umleið 10 minuttir). Út frá samlaða skapilsinum, skal hvør einstaki bólkur leggja fram síni uppskot til skeiðið fyri restina av flokkinum.

#### 3. Eftirmet hugskot

Hvør bólkur fyllir út næmingaarkið, har grundgivið verður fyri teirra hugskotum út frá fylgjandi spurningum:

- Hví er hugskotið rættiliga gott?
- Hvør fær fyrimun av hugskotinum?
- Er hugskotið skaðiligt fyri nakran?
- Brýtur hugskotið nakrar avtalur, reglur ella lógir?

Takið samanum: Hvør bólkur lesur sínar grundgevingar upp, ella øll ganga runt og lesa grundgevingarnar hjá hvørjum øðrum.

#### 4. Tey næstu stigini

Greið næmingunum frá, hvussu hugskotini fara at vera brúkt, og hvussu tú vilt raðfesta og gera av, hvørjum hugskotum tit fara at arbeiða við.



# Næmingaark



Hví er hugskotið rættiliga gott?

Hvør fær fyrimun av hugskotinum?

Er hugskotið skaðiligt fyri nakran?

Brýtur hugskotið nakrar avtalur, reglur ella lógir?

# 2.j. Legubál av hugskotum og broyttari hugsan

Hetta amboðið er ment av **Amondo.**
Sí meira á síðu 2.



Hetta amboðið kann brúkast av einum lærara, sum ynskir at fáa næmingarnar við til at menna hugskot til læruskeið.

Floksvenjing: Munnlig, skrivlig, rørsla
Tíð: 2 tímar

Endamálið við amboðinum er at lata næmingarnar koma við hugskotum og uppskotum til eitt læruskeið. Teir skulu hvør í sinum lagi skriva síni hugskot og síðani kjakast um tey og vera opnir fyri at broyta hugsan.

## Hvussu

## Í skúlaflokkinum

### 1. Greið frá

Sig flokkinum frá, at tey skulu hjálpa til við hugskotum til, hvussu eitt læruskeið skal setast saman, og at tey skulu grundgeva fyri og ímóti teimum ymsu hugskotunum. Byrja við at kunna næmingarnar um skeiðið og gev teimum nøkur dømir. Um tú hevur hug, kanst tú biðja næmingarnar hugsa um undanfarin skeið fyri síðan at meta um, hvørji teimum dámdu best og hví. Legg fram lærumálini og rammurnar fyri næmingunum.

### 2. Legubál av hugskotum

Næmingarnir sita í rundingi. Bið teir ímynda sær eina verð, har alt er møguligt og har alt ber til. Skriva ein høvuðsspurning á eitt stórt pappír og legg tað í miðjuna á rundinginum, (legubálinum). Til dømis kundi spurningurin verið: "*Hvussu kann undirvísingin um xx gerast spennandi?*".

Næmingarnir skriva stillisliga eitt hugskot á eitt pappír. Pappírini vera løgd rundan um høvuðsspurningin sum “brenni til bálið”. Tá allir pappírsleparnir við hugskotum eru lagdir fram, flokkar lærarin hugskotini.

### 3. Torir tú at broyta hugsan?

Legg eitt kjakevni fram, sum er komið upp undir menningini av hugskotum, til dømis, “Vit mugu geva hvørjum øðrum afturboðanir”.
Allir næmingar fáa eitt pappír, har teir tekna virðislinjuna (sí næstu síðu). Næmingarnir umhugsa sína støðu í umleið ein minutt, og merkja staðið á virðislinjuni, sum best lýsir teirra verandi støðu.

Greið næmingunum frá, at teir til eina og hvørja tíð kunnu strika og seta eitt nýtt merki á, um teir broyta hugsan. At tora at broyta sína hugsan, má roknast sum nakað jaligt, um tú fært nýggjar upplýsingar, ella lærir nakað nýtt gjøgnum kjakið.

**Fyrsta umfar:** Næmingarnir ganga millum hvønn annan og finna ein floksfelaga, sum hevur somu meining, sum teir sjálvir. Hvør næmingur grundgevur fyri sínari støðu, og saman kjakast næmingarnar um støðurnar í 2-3 minuttir.

**Annað umfar:** Næmingarnir finna ein floksfelaga, sum hevur øðrvísi hugsan enn teir sjálvir. Hesir báðir næmingarnir kjakast um síni ymisku sjónarmið í 2-3 minuttir.

**Triðja umfar:** Næmingarnir venda aftur til floksfelagan frá fyrsta umfari og kjakast um, um teir hava broytt sína upprunaligu meining. Henda venjingin verður endurtikin við einum nýggjum kjakevni, sum er komið upp undir menningini av hugskotum.

### 4. Tey næstu stigini

Greið næmingunum frá, hvussu hugskotini fara at vera brúkt, og hvussu tú vilt raðfesta og gera av, hvørjum hugskotum tit fara at arbeiða við.



# Virðislinjan

Staðfesting: ***Vit mugu geva hvørjum øðrum afturboðanir (dømi)***

| + | O | ÷ |
|---|---|---|
| Púra samdur | Uttanveltaður/óvissur | Ósamdur |



**Prei**

Tú kanst eftirmeta virksemið í flokkinum út frá hesum spurningum:

- Broytti tú hugsan?
- Hvat ávirkaði teg til at broyta hugsan?
- Hvat gjørdi tað trupult at lurta eftir hinum ella broyta teirra hugsan?

# 2.k. Formur til raðfestingar

Hetta amboðið er ment av Amondo.
Sí meira á síðu 2.

Hetta amboðið kann brúkast av einum lærara, sum vil fáa næmingarnar við til at raðfesta hugskot til eitt læruskeið.

Floksvenjing: Munnlig, skrivlig, rørsla

Tíð: 1 tími



Endamálið við amboðinum er, at næmingar skulu arbeiða í bólkum og raðfesta hugskot til eitt nú eitt ávíst læruskeið, grundað á ymisk eyðkenni.



## Hvussu

### Fyrireiking

Skriva notat við hugskotum, sum næmingarnir skulu raðfesta. Til dømis tey hugskot, sum eru komin fram í samband við eitt av hinum amboðunum í verkinum.

### Í flokkinum

#### 1. Greið frá

Fortel næmingunum, at teir sleppa at hjálpa við at raðfesta og avgera, hvørji hugskot og uppskot tú fert at arbeiða við.

#### 2. Tekna formin til raðfestingar

Tekna formin til raðfestingar á talvuna ella annað hóskandi stað uttandura. Greið næmingunum frá, at tit í felag skulu seta tykkara hugskot í fýra øki. Greið frá, hvat økini merkja. Být næmingarnar upp í bólkar við umleið fýra í hvørjum. Být notatini við hugskotum út til hvønn bólkin, og lat tey kjakast um hvat øki tey halda hugskotið skal leggjast í (umleið 5-7 hugskot fyri hvønn bólkin). Brúka umleið 10 minuttir. Hvør bólkur leggur síni hugskot í økini, tey hava valt, og greiðir frá hví.

#### 3. Raðfestingar

Sig flokkinum, hvat fer at henda við teirra raðfestingum. Til dømis kanst tú hava eina atkvøðugreiðslu fyri hugskotini, sum liggja í “Verkætlanarpílinum” og kanska tey í “Kanska pílinum”.

#### 4. Tey næstu stigini

Sig flokkinum, hvussu tú fert at gera, út frá tí, tú hevur tikið avgerð um.

# Formur til raðfestingar

**Krevur nógv arbeiði**

### ”Kloddarúgvan”

Hugskot, sum eru ov stravin í mun til, hvat vit fáa burturúr



### ”Verkætlanarrúgvan”

Hugskot, sum krevja planlegging, og til dømis at draga leiðslu, næmingaráð og kommunu uppí



**Krevur ikki nógv arbeiði**

### ”Kanska”

Hugskot, sum vit ikki fáa nógv burturúr, men sum vit kundu hugsað um at farið undir at arbeitt við



### ”Lágt hangandi frukt rúgva”

Hugskot, sum kunnu byrja í morgin.



**Vit fáa bara lítið burturúr**

**Vit fáa nógv burturúr**

# 2.I. Samanumtøka av, hvussu næmingarnir uppliva næmingaluttøku

Hetta amboðið varð ment av Styrelsen for Undervisning og Kvalitet. Sí meira á síðu 2.

Hetta amboðið kann brúkast av lærarum til at kanna, hvussu næmingarnir uppliva tað at luttaka í undirvísingini.

Tíð: 1 tími

Hetta amboðið hevur tríggjar mannagongdir, sum kunnu geva tær eina løtumynd av upplivingini hjá næmingunum við teirra luttøku í undirvísingini.

Tað er týdningarmikið, at næmingarnir kenna mørkini og væntanirnar til afturboðanina. Fyri at fáa íblástur eru her nakrir spurningar, sum kunnu blíva brúktir, meðan tit arbeiða við teimum trimum háttunum.

**A.** Nevn nøkur dømi um øki, har tit sum næmingar halda tykkum hava havt ávirkan á undirvísingina.

Til dømis, hevði tú havt nakra ávirkan á...

- Hvat skeiðið skuldi vera um?
- Verandi tema/evni?
- Hvussu tit skuldu arbeiða/samarbeiða?
- Val av formi fyri framløgu?
- Úrslit?
- Annað?

**B.** Eru tað øki, har tit høvdu viljað havt størri ávirkan í sambandi við undirvísing í framtíðini?

Tað ber væl til at seta eykaspurningar, sum snúgva seg um bókligu og sosialu avrikini hjá næmingunum o.s.fr., í sambandi við undirvísingarskeiðið. Sí eisini amboð 2 b. *Yvirlit* til at finna íblástur til afturboðan, sum fer afturum undirvísing.



# Mannagongdir:



1. Framhaldandi afturboðan

   Í byrjanini av skúlaárinum kann lærarin tilnevna tveir ella tríggjar næmingar, ið hava ábyrgd av at geva teirra egnu sjálvbodnu og óformligu afturboðan um undirvísingina, harundir hvørjar møguleikar fyri luttøku, næmingarnir hava upplivað í samband við, t.d. arbeiðshættir, val av hættum og tilfari. Afturboðanin kann vera í fríkorteri, eftir ein tíma ella í endanum á skeiðinum. Næmingarnir kunnu veljast tilvildarliga, til dømis við loyniliga at merkja 2-3 stólar í hølinum, ella teir kunnu vera valdir til at umboða ymisk sjónarhorn millum næmingarnar. Á henda hátt kann lærarin fáa beinleiðis afturboðan um undirvísingina.

2. Myndatalvur

   Bið næmingarnar at hava samrøður við hvønn annan tveir og tveir út frá nøkrum felags spurningum um teirra upplivilsi við ávirkan í sambandi við, t.d. arbeiðshættir, val av hættum og tilfari. Um tað er neyðugt, kunnu næmingarnir brúka reflekterandi spurningarnar omanfyri sum útgangsstøði.

   Hvør bólkur ger eina myndatalvu, sum stutt lýsir sjálvhugsanina um spurningarnar. Myndatalvurnar vera hongdar upp í flokshølið. Øll lesa talvurnar, og lærari og næmingar umhugsa, hvat hevur riggað væl, og hvar menning kann vera gagnlig í sambandi við framtíðar skeið.

3. Skriva í tveir minuttir

   Næmingarnir skriva sínar upplivingar av møguleikanum fyri luttøku niður, umframt týdningin av hesum fyri teirra arbeiði, tilelving, fyrimunir, o.s.fr.

   Hendan venjingin kann passandi vera í endanum av einum tíma, mitt í ella til síðst - til dømis út frá reflekterandi spurningunum omanfyri.

   Lat næmingarnar arbeiða hvør sær, og nýt stoppur. Savna ískoytini hjá næmingunum saman og tosið saman um upplivingarnar, møguleikarnar og avbjóðingarnar.



# 2.m. Spurningar til sjálv-reflektión fyri at varðveita arbeiðið fyri luttøku

Hetta amboðið varð ment av Styrelsen for Undervisning og Kvalitet. Sí meira á síðu 2.

Hetta amboðið kann brúkast av leiðsluni til at tosa við starvsfólkini um, hvussu arbeiðið hjá skúlanum við næmingaluttøku áttið at verið ment og skipað.

Tíð: 2 tímar

## Hvussu

**A.** Tosa við starvsfelagar um nakrar av teimum núverandi avbjóðingunum, ið tit sum skúli hava í samband við næmingaluttøku og virksemi.

Til dømis kunnu tit nýta úrslitini frá *Pulsmátingini* ella einum av hinum amboðunum, sum eru lýst í fyrsta parti at hesum verkinum sum byrjanarstøði í hesum kjaki.

**B.** Skrivið niður saman við starvsfeløgum nakrar av teimum týdningarmestu avbjóðingunum.

**C.** Tosið saman í smáum og størri bólkum, hvagar tit vilja fara:
- Hvat eyðkennir broytingina, sum tú ætlar at fremja?
- Hvussu fer tað at síggja út um til dømis eitt ár, um tú hevur nátt ta menningina, tú vilt hava?
- Hvussu fara lærarar at samarbeiða?
- Hvat fer at eyðkenna professionella kjakið?
- Hvussu sær ein typiskur flokkur út?

Greið stutt frá ynsktu broytingini.

**D.** Tosið um, hvørji tekin eru á leiðini, at tit eru á rættari kós:
- Eru tað nakrir samarbeiðsbygnaðir, sum skulu uppá pláss?
- Er tað nakað serligt, sum tú, sum leiðsla, átti at spurt um á leiðini - og hvussu skal tað gerast?

Ger semju um 3-4 ítøkilig tekin á leiðini, sum vísa, at verkætlanin hevur rætta kós.
Skriva tína áskoðan niður á eitt felags skjal.

**E.** Tosið um og skrivið, hvat skal henda upp á stutta tíð /1-2 mánaðir) um tit skulu náa ta menning, sum tit vilja hava.
- Hvørjar semjur áttu at verið gjørdar?
- Hvørjar gerðir eru neyðugar?
- Hvussu fara tit í leiðsluni at fylgja upp?

Gerið av, hvør veruliga ger hvat, um tit skulu náa tað, tit eru samd um.
Endurtakið hetta kjakið ígjøgnum árið.

**F.** Í seinasta lagi í endanum av menningargongdini ella skúlaárinum mugu tit meta um ynsktu menningina.

Tosið við starvsfólkini um, hvar tit nú eru í samband við settu málini og hvørjar nýggjar semjur og tiltøk, tit kunnu seta í verk fyri at viðlíkahalda og styrkja menningina.

# ÍSKOYTI

Brot í putlispæli til **amboð 2.d.**

Verkætlanarpílur til amboð **2.e.**



# Brot í putlispæli



# Innihald

Hvørjum átti flokkurin at arbeitt við?



# Karmur

Hvussu er karmurin?

# Skap

Hvussu skuldu vit arbeitt við hesum?

# Úrslit

Hvat slag av úrsliti skal flokkurin koma við?

# Afturboðan

Hvør gevur afturboðan? Hvar og hvussu?

# Eftirmeting

Hvussu skal flokkurin eftirmeta skeiðið?

# Tóma brotið

Er nakað at leggja afturat mannagongdini?

Vælvera?

Rørsla?

Næmingavirksemi?

Heilasteðgir?

# Verkætlanarpílur



# NOTATIR:

# NOTATIR:

**Næmingaluttøka** Mannagongdir og amboð at styrkja næmingaluttøku í grund- og miðnámsskúlum

Nordisk Ministerråd

Útgivið við stuðli frá Norðurlendska Ráðharraráðnum.

Design: Center for Presse og Kommunikation

ISBN No.: xxx xxx xxx xxx

Hetta verkið kann ikki bíleggjast.
Vís vinarligast til netútgávuna.

Verkið kann takast niður av:
**www.emu.dk**

Børne- og Undervisningsministeriet
Styrelsen for Undervisning og Kvalitet
Teglholmsgade 1
DK 2450 Köpenhamn SV

